Framhald av síðu 2

Fyrisitingarliga tekur deildin sær av tí studningi, sum løgtingið letur kommunum til havnabygging. Deildin tekur sær av góðkenning av leigusáttmálum á havnaøki. Deildin tekur sær eisini av skipa- og vørugjøldunum saman við Starvsnevnd Føroyskra Havna. Endiliga umsitir deildin tað, sum viðhvørt í smáskemti verður nevnt 'dronningens vand' – yvirvaldsrættin á sjónum í sambandi við útbyggingar í sjógv o.a.

Havnir er eitt fleirtáttað fak, har vit sjálv vanliga hava tikið okkum av prosjektleiðslu og forkanningum. Prosjekt og eftirlit liggur hjá ráðgevum og arbeiðstakarar gera arbeiðið.

Prosjektleiðsla er tað at síggja uppgávuna, at síggja hvønn smálut í heildini, at síggja partarnar í málinum og fáa eina heild burturúr, bæði tekniskt, fíggjarliga og menniskjaliga.

Prosjektleiðsla er at fáa tað besta burturúr hvørjum fólki, hvørji støðu og hvørji krónu.

Í hesum soltnu tíðum hevur tað harafturat verið okkara uppgáva at halda saman uppá fakið havnabygging, serliga havandi í huga, at tær ráðgevandi fyritøkurnar nógvar fóru fyri bakka.

Partur av hesi uppgávu er at skipa vitanina í arkiv, soleiðis at tað ber til at koma aftur til, hvat bygt var og hvussu.

Deildin samskipar raksturin av ferjulegunum kring landið.

Deildin umsitur uppseting av anodum á stálspunsveggjum, soleiðis at virðir ikki óneyðugt fara fyri skeyti.

Deildin umsitur og samstarvar saman við danska Farvandsvæsenet upplýsingar um havnir og sjófarleiðirnar innansyndis. Hon er í tí sambandi eisini hjálp hjá kommununum at halda teirra vitar.

Deildin er virkin partur í aliumsitingini.

Deildin ger ymsar mátingar kring landið, bæði av streymi, aldu, vindi, vatnstøðu, frárenningum og øðrum og er samskipari av upplýsingunum, sum vit fáa frá Dansk Meteorologisk Institut um teirra mátingar.

Deildin er við í viðgerðini av kanningum. M.a eru vit júst liðug við eitt alduatlas og vóru farin undir at gera normar – fyrst ein vindnorm - fyri Føroyar og vóru farin undir streymmátingar í sambandi við aling saman við øðrum pørtum.

Deildin ger botnkanningar
Deildin tekur sær av uttaneftir samskifti viðvíkjandi havnum, havnabygging og mátingum, m.a. PIANC, Dansk Hydraulisk Institut og Dansk Meteorologisk Institut.

Hetta – og helst meira afturat – skal alt leggjast inn í 7 høvd og 14 hendur. Tað krevur eina fakliga breidd hjá tí einstaka og heildini. Eftir altjóða mátistokki er hetta ein heilt óvanlig breidd.

Hetta er eitt dømi. Aðrar deildir hava tað á sama hátt.

Hetta er partur av tí førningi, sum vit verja.

Niðurstøða:
Okkara støða er rættiliga greið. Føroya fólk hevur goldið fyri okkum í 50 ár og hevur ein arv, sum vit í dag umsita.

Vit vilja verja hendan arv á sama hátt, sum stovnurin hevur bygt upp øll hesi 50 árini: fakliga rætt og opið fyri fólkinum.

Vit arbeiða ikki við goymdum dagsordanum. Viðurskiftuni á stovninum skulu út til fólkið at meta um.

Tá so stór virði standa uppá spæl hevur eisini landsstýrið rætt – og skyldu - til at fáa bardagan fyri hesum virðum fram, soleiðis at tað kann taka støðu út frá einum breiðum, demokratiskum støði.

Tá landsstýrismaðurin allment hevur ákært okkum, so hava vit bert tann eina møguleikan: at lýsa viðurskiftuni allment.

Á sama hátt sum higartil, rokna vit tí fyri givið, at landsstýrið ikki formelt leggur seg út í okkara fakliga virksemi hesar dagarnar. Í hesi óvirðiligu uppsøgn Hennings er hetta hóast alt ein virðilig støða, sum løgmaður hevur tikið.

Vit á stovninum standa fram í hesum bardaga, tí eingin annar kann taka júst hendan bardagan. Okkara mótstøðufólk eru ikki løgting, løgmaður ella landsstýrismaður, men tað lættisoppa leiðsluprinsipp, sum fyrst forkom okkum Fiskasøluna, síðani fiskavirkini og var væl áleiðis at forkoma okkum Elektron.

Vit skulu eisini hava í huga tær menniskjalagnur, sum vit kastaðu í vanæru ígjøgnum royndir, sum ein og hvør kundi sagt við seg sjálvan vóru deyðadømdar. Í okkara føri er longu ein persónur førdur út í slíka vanæru. Tað er ein ov nógv!


At góð fólk nú royna at savna restirnar av Fiskasøluni og Fiskavirking er sjálvandi gott – men ikki serliga optimalt.

Tað er eisini hetta lættisoppa leiðsluprinsipp, sum nú er við at petta landið í so mangan óneyðugum bardaga: kommunu móti kommunu, land móti kommunu, kommunu móti landi, løgting móti landsstýri, landsstýri móti løgtingi. Helst kundu vit nevnt fleiri øki.

Vit vita væl, at tað er landsstýrið, sum hevur fyrisitingarligu ábyrgdina. Men tað er bert løgtingið, sum hevur heimild til at søpla fedranna arvin burtur yvir eina nátt. Tað er Føroya løgting, sum skal út til fólkið og allment siga: hendan arvin hava vit ikki fyri neyðini.

Vinarliga deildarleiðarar hjá Landsverkfrøðinginum (onkur er ikki tøkur)

Signar P. Heinesen
Arnstein Niclasen
Levi Hentze
Hans Biskopstø
Finnleif Durhuus
Óli M. Petersen



KROSSORÐAGÁTA

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: DRUNNLITTUR

D	J	Ú	P	V	A	T	N	S	T	R	O	L	A	R	I
U		R	I		G	Í		N		A		Í	Ð	A	N
N	R			V	A	Ð	B	E	I	N		N	A	I	N
N		E	L		P	A	U	L	I		G	U	L	N	A
U	P	P	I		E	R		L		K	Y	K		A	N
H	E		V	A		R	A	U	L			V	A	R	G
Y	L	U	R		B	I	R	T	A		P	E	R		A
L	Í	N	U	B	Á	T	U	R		T	E	Y	M	A	R
U	K		M	Á	L		M	U		A	R	L	A		Ð
R	A	K		R		A		M	S		M	A	R	I	S
N	R		A	U	T	O	L	Í	N	U	R		L	T	
N		O	K	N	I	N		A	L	D	R	I	N		E
A	L	A	N		G	I	N			R			E	L	I
N	Á	T	I	N				A	R		S	T	Y	G	G
O		I		E	B	B	E	S	E	N		V	S		U
K	R	A	F	T	B	L	O	K	K	A	B	A	T	U	R

Hvønn leygardag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi *í seinasta lagi hósdagin.* Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. ...«** á bjálvan.

Vinnari: Høgni L. Rasmussen
á Frælsinum 8
100 Tórshavn

Loysunarorð: 185

Navn:

Bústaður:

Bygd/býur:

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:

- ❑ **Ljósini slókna**
- ❑ **Søgur úr Port Janua**
- ❑ **Bíblian í orðum og myndum**
- ❑ **Indiánararnir. Søgan um upprunafólkið í Norðuramerika**
- ❑ **Mangt er millum himmal og jørð**

Frá FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:

- ❑ **Samfelagsfrøði 1. Tú og samfelagið**
- ❑ **Heimssøga 1**
- ❑ **Søgan um hini**
- ❑ **Lív og gróður**
- ❑ **Orðaskyn. Mín fyrsta orðabók**

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt.